# Friðarlig ólavssøka á skaðastovuni

ÓLAVSSØKAN 2002
*Ragnhild Ellingsgaard*

Á skaðastovuni hava tey ikki bitið so nógv merki í, at Ólavssøkan hevur verið seinasta vikuskiftið. Enn hava tey ikki gjørt upp, hvussu nógv fólk eru komin inn á gátt hjá teimum farna vikuskiftið, men heilt illa statt hevur tað so ikki verið.

- Ólavssøkan hevur ikki givið okkum meir at gjørt, enn hvat eitt okkurt annað tilvildarligt vikuskiftið vildi gjørt, siga tey frá skaðastovuni á Landssjúkrahúsinum.

Talan hevur ikki verið um nakrar álvarsligar skaðar, men heldur um drukkin fólk, ið eru dottin ella hava skorið seg av einhvørjum.

Ein av orsøkunum til, at stevnan hevur verið so friðarliga, er uttan iva hjálpin frá sámarittunum hjá Reyða Krossi. Sámarittarnir hava gingið úti á gøt-unum alla stevnuna, og eru tey skjót at veita eina hjálpandi hond, um okkurt skuldi verið áfatt.

- Tey eiga at fáa eitt stórt herðaklapp fyri eitt vísa eitt so flott intiativ, heldur yvirlæknin á Landssjúkrahúsinum og leggur afturat, at uttan sámarittarnir høvdu uttan iva fleiri fólk endaði á skaðastovuni.

# 14 ára gomul genta neyðtikin

ÓLAVSSØKAN 2002
*Ragnhild Ellingsgaard*

Týsnáttina kom ein 14 ára gomul genta inn á politistøðini í Havn. Hon vildi boða frá, at hon fyrr um náttina var vorðin neyðtikin. Gentan hevur nú verið til læknakanningar, og staðfesta hesar kanningar, at skelkandi hendingin er farin fram.

Løgreglan ynskir tó ikki at koma út við nøkrum útsøgnum enn, tá so stutt tíð er fráliðin, síðan hendingin fór fram.

- Vit kanna málið, men enn ber ikki til at koma út við nøkrum detaljum, tá hetta kann ávirka kanningararbeiðið, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Sostatt vil hann heldur ikki siga, um gerningsmaðurin er funnin ella handtikin longu nú.

- Tað einasta, ið vit vilja staðfesta, er at hendingin er farin fram. Restin má bíða, til kanningararbeiðið er liðugt, greiðir hann frá.

# Drongur sligin við fløsku

ÓLAVSSØKAN 2002
*Ragnhild Ellingsgaard*

Undir kappróðrinum á Ólavssøku kom ein 15 ára gamal drongur út fyri eini minni hugnaligari hending. Undir sjálvum róðrinum varð hann nevniliga sligin í høvdið við eini fløsku. Drongurin meldaði sjálvur tilburðin til løgregluna seinni um dagin, og løgreglan veit, hvør gerningsmaðurin er.

Helenda Dam á Neystabø í setanarrøðuni:

# Vit skulu standa saman um Føroyar

**Helena nýtti í setanarrøðuni á Ólavssøku høvi til at minna okkum øll á, at vit eiga at standa saman um tjóðina Føroyar**

ÓLAVSSØKAN 2002


*Helena Dam á Neystabø, fyrrverandi landsstýriskvinna, flutti fram røðu til setanarhaldið*

Í bakandi sól varð Ólavssøkan 2002 sett sjálva ólavssøkuaftan. Nógv fólk vóru savnaði saman til setanina, og saman við skrúðgonguni varð enn eina ferð skjøtul settur á tjóðarhátíð okkara.

Helena Dam á Neystabø, fyrrverandi landsstýriskvinna, flutti fram setanarrøðuna. Hon byrjaði røðuna við at umrøða sjálva hátíðina, sum enn einaferð hevði savnað so nógvar føroyingar á sama staði.

Við hvør sínari søgu og hvør sínum dreymum stevna føroyingar til Havnar at halda Ólavssøku. Og á Ólavssøku er eisini pláss fyri øllum, helt Helena.

- Hetta eru dagar, sum binda okkum saman. Hetta eru dagar, tá tað sum skilur okkum sleppu at bíða. Hetta eru dagar, ið skulu vísa okkum vegin fram. Ólavssøkan er ikki bara ein skái, segði Helena millum annað í byrjanini av røðuni.

## Standa saman

Helena nýtti eisini høvi til at minna okkum føroyingar á, at tjóðin Føroyar ikki er nøkur sjálvfylgja. Tí eiga vit eisini at halda fast við okkara túsund ára gomlu søgu og mentan, umframt at vit eisini líta frameftir.

- At standa saman sum fólk merkir ikki, at vit øll skulu vera eins ella hava somu meiningar. Tað merkir, at vit standa saman um at tryggja, at vit vinna øll ty rættindi, sum ein natión hevur rætt til. Standa saman um at tryggja, at vit eisini í framtíðini kunnu vera ymisk, fjølbroytt og fræls, og at pláss er fyri øllum – serstakliga teimum, sum av ymsum ávum fingu tað trupult, segði Helena í røðuni.

Hetta eru virði, sum, sambært Helenu, saman mynda okkar samleika.

- Tað er eingin sjálvfylgja, at tað er so. Hetta er ein gáva og ein uppgáva – hvønn einasta dag. Hjá tær og hjá mær – og sjálvandi eisini hjá okkara politisku leiðslu, førdi Helena fram.

Eisini søgan hjá Føroya Løgtingið fekk nøkur orð á vegnum.

- Tað er skyldan hjá okkum øllum at standa á varðhaldi um aldargamla Føroya Løgting, demokratiska umboðsstovn okkara, segði Helena.

Ólavssøkan 2002:

# Strævið vikuskifti hjá løgregluni

ÓLAVSSØKAN 2002
*Ragnhild Ellingsgaard*

Seinasta vikuskiftið hevur verið langt og strævið hjá løgregluni í Tórshavn. Einir 20 mans hava skifts um at verið til arbeiðis, og er hetta væl fleiri enn eitt vanligt vikuskifti.

- Størsti trupulleikin er avgjørt druk, druk og aftur druk. Ólavssøkan er vorðin ein reguler drukfest, og fólk eru sansaleyst rúsaði, sigur vakthavandi á politistøðini.

Enn hevur løgreglan ikki fingið til vega nøkur hagtøl, ið vísa hvussu nógvar vitjanir, talan hevur verið um á Ólavssøkuni. Men vakthavandi veit tó at siga, at støðin hevur hýst 21 gestum, ið av ymsum áðum ikki náddu at koma heim, áðrenn rúsurin tók yvir.

Hetta er eitt tal, sum samsvarar væl við tølini frá undanfarnu Ólavssøkum. Í 1992 var talan um 39 náttargestir, og fall talið eitt sindur komandi árini. Í 1998 hevði løgreglan vitjan av 28 náttargestum, og varð talið í ár sum nevnt 21.

Hóast talið er minkað, so heldur vakthavandi á politistøðini, at torført er at meta um, hvørt støðan er nakað munandi betrað.

- Talið varirerar altíð eitt sindur, tá vit jú hava við rúsaði fólk at gera. Tó liggur tað altíð eitt sindur stabilt, og tí er torført at siga, hvørt støðan er versnað ella blivin betri, heldur hann.

Hann leggur afturat, at talan ikki er um nakran ávísan málbólk, ið endar hjá løgregluni orsakað av rúsandi evnum.

- Talan hevur í ár verið um heilt ung niður í 12-ára aldurin, eins væl og vit eisini hava fingist við heilt tilkomin fólk. Tey hava øll fingið ov nógv niðurum, og duga sær tí ikki hógv, greiðir vakthavandi frá.

Harafturat koma eisini allar uppringingarnar um størri og smærri skaðar, sum løgreglan fær. Tá ringir løgreglan til sjúkrahúsið, sum síðani sendur sjúkrabilin út eftir fólkunum.

- Ólavssøkan í ár hevur ført til stak nógvar uppringingar. Hetta eru fólk, sum eru komin til skaða á ymsan hátt. Sum oftast stendst hetta aftur av ov stórum rúsi, sigur vakthavandi.

Hann heldur ikki, at talan í so mongum førum er um onnur rúsevni enn alkohol. Heldur er tað ein blanding av ymsum, sum ger fólk so í ørviti, at løgreglan má upp í leikin.



Ólavsøkukabarettin 2002:

# Ein mjørkadagur við sólglottum



**Ólavsøkukabarettin 2002 varð send av bakkastokki leygarkvøldið klokkan 19 fyri fullum Sjónleikarahúsi. Men áskoðararnir flentu ikki takið av húsunum, tí satt at siga, var ikki so nógv at flenna eftir**

UMMÆLI
*Ingrid Bjarnastein*

Vónirnar hjá leikararunum undan ólavsøkukabarettini vóru stak góðar. Teir lovaðu áskoðarunum eina stuttliga kabarett við nógvum feitum innsløgum. Og leygarkvøldið skuldi slagið standa. Klokkan 19.00 varð kabarettin send av bakkastokki fyri fyrstu ferð fyri fullum Sjónleikarahúsi. Men smílivøddarnir vóru tó ikki so nógv brúktir, sum ein kanska hevði væntað.

Men tó, her skal ikki sigast, at kabarettin als ikki var stuttlig. Tí hon hevði heilt vist sínar ljósu løtur, har leikararnir veruliga megnaðu at fáa meira enn eitt hálvhjartað smíl frá áskoðarunum.

Og nógv vóru, sum fingu toyggið. Lagt varð út við sjálvum Mr Big. Ein væleydnað parodi við upptøkutóli og øllum. Og vendi hesin sami aftur nakrar ferðir ígjøgnum kabarettina, bæði við og uttan brillur.

## Bill og øl

Nýggi trivnaðarmálaráðharrin, sum hevur verið nógv at hoyrt til í seinastuni, stóð eisini fyri skotum. Við sínum sjónarmiðum um rúsdrekka stóð hann á pallinum í klædningi og við veingjum og prædikaði sínar hugsanir.

Suðuroyingar, Reidar Nónfjall og Smyrol vóru eisini uppi og vendu saman við Sámal Petur, Annlis Bjarkhamar, bispi, nýggja landsliðsvenjaranum, Henrik Larsen, Trónda Patursyni og øðrum.

Og ungi Brandur Enni fekk eisini av grovfílini hesa kabarettina. Við eini heliumsballón varð sungið »I´ll be waiting in the moonlight« saman við dansigentu og øllum, sum hartil hoyrir.

Eisini høvdu leikararnir lovað áskoðarunum ein hvøkk. Og tað eydnaðist eisini, men tað, sum kanska heldur var eitt sindur »keðiligt«, var tá øl (ella var tað vatn?) varð stoytt yvir áskoðararnar. Men alt í lagi. Tað var ikki so nógv, als ikki, nakrir dropar, men kanska summi hava hug at rykkja brýr um tey hava latið seg í sítt fínasta ólavsøkustás.

Mest heilhjartaða spælið var frá tónleikarunum hetta kvøldið. Allir í reyðum oberts-jakkum sótu teir so fittir, og fullførdu teir teirra uppgávu til lítar. Eitt veruligt herðaklapp til tónleikararnar.

Alt í alt er ólavsøkukabarettin tó ikki so galin. Lat ikki hetta ummælið steðga tær við at fara niðan í sjónleikarahúsið, tí tú ført heilt vist smílið fram, har tú gloymir tínar sorgir eina løtu. Men harafturat, so tykist ólavsøkukabarettin sum ein hálvhjartað roynd uppá at fáa fólk at flenna eftir tí, sum í síðsta enda ikki hevur havt so nógv at siga.

ÚTSØLA
30. JULI

Braun El Ketil wk210
Vanl. prísur 625,-
Nú einans 499,-

Blomberg eymhetta dz610, hvít 310 m3
Vanl. prísur 1195,-
Nú einans 895,-

VØSK FRÁ BLANCO

Blanco mega vask v/bakka 6s
Vanl. prísur 4050,-
Nú einans 2835,-

Blanco viva vask 60 cm 6
Vanl. prísur 2053,-
Nú einans 1542,-

Blanco Classic 8
Vanl. prísur 4407,-
Nú einans 2864,-

Siemens komfýrur v/luft grill & keramik
Vanl. prísur 9195,-
Nú einans 7795,-

| | | |
|---|---|---|
| Ideline honddustsúvari | 530,- | 365,- |
| Voss eymhetta vhm605-0 stál 363 m3 (58db) | 4195,- | 3145,- |
| Voss eymhetta vhm617-1 hvít 560 m3 (50db) | 3595,- | 3055,- |
| Voss eymhetta vhm605-1 hvít 363 m3 (58db) | 3295,- | 2195,- |
| Moulinex hvirla (avmarkað nøgd) | 668,- | 499,- |
| Moulinex fritura Acp251 1000g 18W (Avmarkað nøgd) | 998,- | 798,- |
| Tefal fritura 6273 1000g 2000 Watt | 1495,- | 1160,- |
| Miéle micro m625w digitalur 21 L | 5430,- | 4895,- |
| Elvita micro 20l. 800 Watt | 1290,- | 999,- |
| Buknecht micro 21L digitalur 1000 Watt | 3395,- | 2795,- |
| Thermex deco vegg eymhetta stál (Avmarkað nøgd) | 7495,- | 6745,- |
| Blomberg komfýrur 50 cm yvir- & undirvarma | 5995,- | 4795,- |
| Miéle fingertouch km465 | | |
| Miéle innb. ovnur h316bw v/luft grill & klokku hvítur | 15990,- | 13995,- |
| Blomberg uppvaskimaskina dwf041 hvít | 5995,- | 5395,- |
| Asko turkitrumla kondens El stýring | 10595,- | 8995,- |
| Asko trukitrumla Avtrek El stýring | 9995,- | 8295,- |
| Creda turkitrumla Kondens | 5995,- | 4395,- |
| AEG turkitrumla kondens (Avmarkað nøgd) | 9795,- | 8815,- |
| AEG turkitrumla Avtrek (Avmarkað nøgd) | 7595,- | 6835,- |
| Bauknecht turkitrumla Avtrek (Avmarkað nøgd) | 5795,- | 4900,- |
| Gram køliskáp ks240-06 H: 1070mm B: 550mm (energi B) | 5995,- | 5090,- |
| Gorenje køl/frysti k336/2p H: 1770mm B: 600mm (energiA) | 10450,- | 8500,- |
| Zanussi køli zt155 H: 85cm B: 55cm (energi A) | 3290,- | 2595,- |

HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi - PO 110 Tórshavn - Tel. 314949 - Fax 311330 - Email:hthduk@post.olivant.fo